## Korrespondent / BA erhvervssprog i engelsk/tysk

POST Greenland, Filatelia, i den østgrønlandske by Tasiilaq (Angmagssalik) søger en korrespondent i engelsk og tysk til tiltrædelse den 1. december 2001 eller efter nærmere aftale.

Filatelia er en afdeling i POST Greenland med ca. 20 medarbejdere, der sælger og distribuerer frimærker samt filateliprodukter til alle posthuse i Grønland og samlere verden over.

Korrespondenten har reference til Salgslederen og varetager engelske og tyske oversættelsesopgaver samt behandling af kundeforespørgsler.

Arbejdsopgaverne kan omfatte oversættelse til og fra engelsk og tysk, behandling af kundehenvendelser, registrering og gennemgang af post på diverse sprog, sparringsredaktør på vores medlemsblad Greenland Collector og ad hoc opgaver.

Vi forestiller os, at du har følgende kvalifikationer:

- Engelsk og tysk i skrift og tale på korrespondentniveau
- Kendskab til andre fremmedsprog vil være en fordel
- Fleksibilitet i det daglige arbejde og hurtig omstillingsevne
- Gode formuleringsevner i dansk, engelsk og tysk, såvel mundtligt som skriftligt
- Rutineret i Microsoft Word og Excel
- Rutineret EDB bruger med kendskab til Concorde

Derudover er du selvstændig, er i besiddelse af gode samarbejdsevner, resultatorienteret og initiativrig og i stand til at arbejde under pres.

Stillingen aflønnes i henhold til kvalifikationer. Der kan anvises bolig til stillingen, for hvilken husleje og depositum betales af dig selv efter gældende regler. Der må påregnes vakant indkvartering, indtil første skib ankommer med dit flyttegods til Tasiilaq omkring den 1. juli 2002. Fri til- og fratrædelsesrejser, samt bohaveflytning efter de gældende regler.

Såfremt ovennævnte har din interesse, er du velkommen til at kontakte Frimærkechef Søren Rose (sro@tele.gl) eller Salgsleder Irene Warming (iwa@tele.gl) på telefon +299 98 11 55.

Skriftlig ansøgning (mærket 1822/200156) vedlagt C.V., kopi af eksamensbeviser og eventuelt referencer, skal sendes til vores moderselskab på nedenstående adresse senest den 19. november 2001.

TELE Greenland A/S
Personaleafdelingen
Postboks 1002
3900 Nuuk
GRØNLAND

For yderligere oplysninger besøg vores hjemmeside:
http://www.stamps.gl

TELE POST



Sosialurin
Veðrið
Bilar
Lýsingar
Tíðindi
Viðmerkingar
Ítróttur
Nøvn
Skráir
Tiltøk



## Íbúð

Fyri eitt av starvsfólkum okkara søkja vit eftir íbúð í Tórshavn, frá 1. desember. Alt hevur áhuga.

Vinarligast setið tykkum í samband við Njal á fartlf. 225415.

**Elding í SMS**
Box 1289
FO-110 Tórshavn





* **Rakimaskinur**
* **Strúkijørn**
* **Krúllujørn**

**...og mangt annað**

Elkeyp
... so einfalt

VikuBlaðið 321 000


veitst tú ikki tað?

## Kvinnuskeið um sjálvsmenning

Ert tú konufólk og hevur áhuga fyri at menna teg persónliga, hevur júst hetta skeið kanska tín áhuga. Skeiðið, sum er fyri kvinnur í øllum aldursbólkum, verður hildið í Havn í døgunum 17.–18. november í ár í Stoffalág 82 frá kl. 9-17 báðar dagar. Luttakaratalið er avmarkað til í mesta lagi 16 luttakarar. Kostnaður er 1850 kr. íroknað skeiðtilfar og kostarhald.

Skeiðleiðari er Anette Sundby. Hon er upprunaliga útbúgvin fólkaskúlalærari, men hevur seinastu 12 árini skipað fyri skeiðvirksemi.

Áhugaðar kunnu fáa nærri upplýsingar um kvinnuskeiðið við at venda sær til Sigrún Mohr, telf. 315298, ella til Anette Sundby, tlf.0045 45424650, telduadr: email@anettesundby.dk Eisini ber til at fara inn á heimasíðuna www.anettesundby.dk

## Pedagogur

Søkt verður eftir pedagogi til barnagarðin við Velbastaðvegin, 40 tímar um vikuna, at byrja 1.desember 2001.

Barnagarðurin við Velbastaðvegin er sjálvognarstovnur og normeraður til 60 børn í aldrinum 3 - 7 ár, býtt sundur í 3 stovur.
Á hvørjari stovu starvast í løtuni tveir pedagogar og eitt hjálparfólk.

Førleikar: Tann ið verður settur, skal hava góð samstarvsevnir, vera kreativur, dáma at vera í náttúruni og síggja møguleikarnar í okkara nærumhvørvi, arbeiða sjálvstøðugt og duga at síggja tørvin hjá tí einstaka barninum.

Løn og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum, skal vera Barnagarðinum í hendi í seinasta lagi 9.oktober 2001 kl. 12.00

Nærri upplýsingar um starvið, fáast við at venda sær til leiðaran á **tlf. 314373.**

**Barnagarðurin við Velbastaðvegin**
Velbastaðvegur 41
FO 100 Tórshavn

## Valevnislistar

Kirkjuráðsval í Kollafjarðar kirkjusókn
6. november 2001

**LISTI 1**

| Valevni | |
|---|---|
| Anfinn Eli Dam | Kollafjørður |
| Óluva N. Djurhuus | Kollafjørður |
| Holger Hansen | Kollafjørður |
| Ingunn Joensen | Signabøur |
| Elvira Poulsen | Kollafjørður |
| Alif Hansen | Signabøur |
| Petur Gilbert Gullaksen | Kollafjørður |
| Odmar Joensen | Kollafjørður |

| Stillarar | |
|---|---|
| Elly Fagraklett | Kollafjørður |
| Ellfríð Dam | Kollafjørður |
| Signa Joensen | Kollafjørður |
| Grettir Djurhuus | Kollafjørður |
| Kitty Hansen | Kollafjørður |

**LISTI 2**

| Valevni | |
|---|---|
| Randi M. Hansen | Kollafjørður |
| Edil Thomsen | Kollafjørður |
| Øssur av Steinum | Kollafjørður |

| Stillarar | |
|---|---|
| Gisleyg Danielsen | Signabøur |
| Olaf Petersen | Signabøur |
| Elsa Samuelsen | Kollafjørður |
| Bjarni Petersen | Kollafjørður |
| Maria av Steinum | Kollafjørður |
| Herborg Christiansen | Kollafjørður |

Valið fer fram á kommunuskrivstovuni nevnda dag kl. 10–12 og kl. 14–20.

**Valstýrið fyri Kollafjarðar kirkjusókn**

## Ókeypis fyrilestur

Ókeypis fyrilestur verður mánakvøldið 29. og týskvøldið 30. okt. kl. 19.00 í Mettustovu v/ Birgitta og Lars úr Svøríki. »Nýggjar leiðir til menning«.

Vegleiðing mánadagin kl. 15.00-18.00 og týsdagin kl. 9.00-12.00 og 14.00-18.00.


VEGG SAGING
Hurðar,vindeygu, veggir, garðar o.a.

HOL SAGING
Frá Ø 24 mm. til Ø 450 mm.

GÓLV FRESING

GÓLV SLÍPING

GÓLV SAGING
Rennir, keiøki, asfalt, upptøka og burturbeining o.a.

Nýggj tænasta til allar havnir í Føroyum.
Nú bora vit eisini hol í allar støddir av dekkum til fríhold.

RO BETO G S G G v/Hjaltur Tausen
Gerðisvegur • 620 Runavík • Tel. 447543 • Fax 448898

Sosialurin - 311820



Byrjurnar skeið í

Concorde C5 Light

31. Oktober

formula.fo
Skeið- og menningardeildin Tel.: +298 311116 · www.formula.fo


# ítróttur

Nr. 208 • leygardagur • 27. oktober 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

## Tær bestu bresta saman

**Sunnudagin hittast tvey tey fremstu liðini í kvinnudeildini. VÍF og Stjørnan vunnu gull og silvur í fjør, og tey eru aftur á odda í ár**

HONDBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*

Sunnudagin fáa fólk fyrstu ábendingina um, hvørja styrki kvinnuliðini hjá VÍF og Stjørnuni hava í ár.

Hesi bæði liðini hava fingið fulla úrtøkur burtur úr trimum teimum fyrstu dystunum í ár og roknað verður við, at liðini fara at verða í topppinum í vetur.

VÍF er favorittur til at endurvinna meistaraskapin. Liðið er sterkt, og nógvir góðir spælarar eru á liðnum. Síðani í fjør eru fáar broytingar hendar á liðnum, og við stórskjúttanum Ioana Rapa á odda verður tað trupult at steðga VÍF-liðnum.

Stjørnan hevur spælt væl higartil í ár, men liðið hevur ikki somu breidd í fjør, tá spælarar sum Vesna Tomajek og Annika Ljósstein vóru afturat. Aðrir spælarar hava tikið við, og nú skulu teir vísa, um teir klára at taka dystin upp við VÍF.



*Andijana Milodanovic og Stjørnan skulu sunnudagin til Vestmanna at spæla ímóti føroyameistarunum. Hetta er ársins fyrsta styrkisroynd millum bestu liðini í seinasta kappingarári. Mynd: Alexander Djorovic*

### Sóljan roynir aftur

Tveir aðrir kvinnudystir verða um vikuskiftið. Í Vági fær VB vitjan av Kyndli sunnudagin, og her er talan um lið, sum hava fingið ymiska byrjan í kappingini.

VB hevur vunnið tveir dystir, men tapti móti oddaliðnum VÍF. Kyndil hevur vunnið ein av sínum fýra dystum, og tí kann VB roknast sum greiður favorittur í hesum dystinum. VB verður av nógvum mett sum fremsti kappingarneytin hjá VÍF til gullið.

Leygardagin verður dystur í Vágum, har Sóljan skal spæla ímóti Neistanum. Sóljan var seinasta vikuskiftið um reppið at koppa Kyndli, men havnarliðið fekk eitt mál meira. Nú skulu vágakvinnurnar royna at vinna á Neistanum.

## Havnarlið kappast um oddasessin

**VÍF skal spæla móti botnliðnum Tjaldri, meðan Neistin og H71, sum bæði hava fult stigatal, hittast í Havn**

HONDBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*

Mest spennandi dysturin hjá monnum hesaferð verður í Havn sunnudagin. Tá fara tveir av kandidatunum til gullið í ár at spæla móti hvørjum øðrum.

Bæði Neistin og H71 hava fingið góða byrjan í nýggja kappingarárinum. Bæði liðini hava spælt tríggjar dystir, og liðíni hava vunnið allar dystirnar.

Tað er greitt, at eftir hetta vikuskiftið kunnu bæði liðini ikki hava fult stigatal.

H71 spældi mikukvøldið í Runavík, og har var tað strævið at vinna á Tjaldri, sum gav stóra mótstøðu. Fram móti endanum av dystinum vóru tað tó hoyvíkingar, sum vóru stinnari.

Neistin mannar gott lið í ár, og sunnudagin skulu teir vísa, at tað eru teir, sum ætla at elta VÍF.



*Øll mansliðini uttan StÍF spæla um vikuskiftið. Neistin og H71 spæla týðandi dyst í Havn, meðan VÍF fær vitjan av Tjaldur*

### VÍF og botnurin

Føroyameistararnir úr Vestmanna fáa sunnudagin vitjan av botnliðnum Tjaldri. VÍF hevur skúgva alla mótstøðu til viks higartil í kappingini, og tað verður eisini roknað við, at teir vinna sunnudagin.

Mikukvøldið dragnaði Tjaldur í endanum av dystinum ímóti H71, og skulu teir fáa nakað burtur úr hesaferð krevst, at teir eru førir fyri at spæla við fullari ferð allar minuttirnar á tamb.

Seinasti dysturin hjá monnum verður millum KÍF og Kyndil, og hesin dysturin verður spældur leygardagin.

Kyndil hevur vunnið ein av sínum fýra dystum í ár, meðan KÍF hevur tapt allar sínar tríggjar dystir.

## Christian Høgni var á beinkinum

**Esbjerg stríddi seg hóskvøldið í fjórðingsfinaluna í steypakappingini**

ÚTISETAR
*Jóannes Hansen*



Christian Høgni Jacobsen var í fjúrtan manna hópinum hjá Esbjerg, sum hóskvøldið var í Århus. Ørindini vóru at stríðast við stórfelagið í Århus um, hvat av sigursvandu jysku feløgunum skuldi vera í hattinum, tá tað á middegi í gjár varð kastaður lutur um, hvussu liðini skulu hittast í fjórðingsfinaluni. Hon verður spæld langa fríggjadag, sum komandi ár verður 29. mars.

Úrslitið var, at Esbjerg vann, og harvið er felagið hjá Christian Høgna Jacobsen eitt av átta, sum framvegis hava møguleikan at vinna DONG Cup, sum danska steypakappingin nú eitur.

Christian Høgni var tann einasti av teimum trimum skiftisspælarunum, sum ikki kom á vøllin.

### Máttu verja væl

Esbjerg legði bragdliga fyri, og fyrra partin av 1. hálvleiki hevði álopsmaðurin Henrik Nielsen tveir góðar møguleikar, sum hann misnýtti.

So kom AGF meiri við, og eftir hornaspark komu teir á odda. Fyrstu løtuna eftir steðgin vóru teir tætt við aftur at skora og harvið næstan at leggja lok á, men tað miseydnaðist.

Í staðin kom Esbjerg fyri seg aftur, og fyrrverandi OB spælarin, Jess Thorup, skoraði tvær ferðir. Í báðum førunum stútaði hann í kassan. Fyrru ferðina eftir hornasparksinnlegg og seinnu ferðina eftir uppspæl í borðinum og høgan bólt innfyri. So ráddi um at verja leiðsluna, og tí var ikki neyðugt at seta ein álopsspælara á vøllin.

Tí kom Christian Høgni ikki inn hesa ferð, men hann er í nánd av besta liðnum, og tað eigur at geva honum hug og nærlagni at dríva á. Kanska hann verður við í fjórðingsfinaluni um fimm mánaðir!

## Støðan 1. Deild menn

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 3 | 3 - 0 - 0 | 91 | 64 | 27 | 6 |
| 2 | H71 | 3 | 3 - 0 - 0 | 82 | 72 | 10 | 6 |
| 3 | Neistin | 3 | 3 - 0 - 0 | 77 | 74 | 3 | 6 |
| 4 | StÍF | 3 | 1 - 0 - 2 | 76 | 79 | -3 | 2 |
| 5 | Kyndil | 4 | 1 - 0 - 3 | 92 | 103 | -11 | 2 |
| 6 | Tjaldur | 3 | 0 - 0 - 3 | 72 | 79 | -7 | 0 |
| 7 | KÍF | 3 | 0 - 0 - 3 | 71 | 90 | -19 | 0 |

## Støðan 1. Deild kvinnur

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 3 | 3 - 0 - 0 | 94 | 57 | 37 | 6 |
| 2 | Stjørnan | 3 | 3 - 0 - 0 | 93 | 68 | 25 | 6 |
| 3 | Neistin | 3 | 2 - 0 - 1 | 75 | 57 | 18 | 4 |
| 4 | VB | 3 | 2 - 0 - 1 | 71 | 62 | 9 | 4 |
| 5 | Sóljan | 4 | 1 - 0 - 3 | 91 | 99 | -8 | 2 |
| 6 | Kyndil | 4 | 1 - 0 - 3 | 90 | 117 | -27 | 2 |
| 7 | StÍF | 4 | 0 - 0 - 4 | 69 | 123 | -54 | 0 |